# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Greta Wenningstedt Villadsen**, vanliga nevnd **Lulla**, andaðist í Holbæk hósdagin, 80 ára gomul.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum fyri sýnda samkenslu,
tá okkara góði maður, pápi, verpápi og abbi

**Aron Strømsten**

doyði og fór til gravar.
Tøkk til Ingu Poulsen Dam fyri góð
og troystarrík orð
Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og tykkum,
sum hjálptu til við ervið.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu Aron til
hansara seinasta hvíldarstað.
Tøkk fyri peningagávur og heilsanir.
Ein heilt serlig tøkk til tykkum á deild 2, sum vóru
so góð við Aron ta tíð hann var hjá tykkum.

*Familjunnar vegna*
**Anna**
**Sigga, Sólrun, Oddvør og Djóni**

**Dagurin**
**8. juni. Medardus**, deyður umleið ár 560. Biskupur í St. Quentin og Tournai í Fraklandi. Í Fraklandi er Medardus verndari hjá øllum teimum, sum hava víngarðar og hjá øllum bryggjarum.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

# Niels Midjord í Fuglafirði

## seksti ár 13. juni

**Kvøldseta verður fyri Nielesi í Mentanarhúsinum kl 20:00 hóskvøldið tann 11. juni**



Millum Kirkjurygg og Ennið býr ein friðar- og fróðarmaður. Hann hevur búð undir Kirkjugjógv og Borgini - á hesum skaldakenda stað, í seksti ár. Niels hevur hoyrt aldargamla tutlið úr Kirkjurygsá, og tá ið veturin hevur sungið sínar vísur, hevur fjalladunið sett sínar hælkoytur í fjallaskalvin ovast uppi. Ei undur í, at maðurin hevur latið úr hondum dygdarverk í orði og ljóði, hevur sæð sólina rísa um Eysturskarð og seta aftan fyri Blábjørg á hásumri.

Tá ið tú kemur um Kirkjurygg, tykist tað okkum, eins og eitt budistiskt tempul er her á leiðini. Hetta tempul rúmar bert einum alheims munki, sum í sínum verumáta, hugsunnarhátti og heimspeki er í sissheimi stóran part av døgninum, og sigur sína mantru. Tað er okkara Niels, og mantran hansara rúmar nógvum.

Tað byrjaði við Tveimum feitum flugum á mentanarstevnuni 1987, sum LISA skipaði fyri, til Alf Proysen, sum kom út á fløgu í føroyskum búna fyri stuttum við honum og Vár Næs sum sangarar.

**Ættin**

Niels er fjøllmentaður. Hann kann føra ætt sína aftur til Kleina familjuna í faðirlegg, sum kom av Strondum fyri meira enn 100 árum síðani. Tað vóru 4 systkin av hesi ætt, sum settu seg niður í Fuglafirði – Nicolina, kona Magnus í Lon, kona Gamla Símun, Suffía, Hans Klein, maður Elina(abbasystir), sum búðu á Høvdanum og kona Pól vesturi í Húsi, Poul Midjord, Kathrina – Stranda Kathrina, langomma Niels. Flestu teirra, sum eru av hesi rót, eru serliga musikølsk her í bygdini t. d. Lonafólkið.

Eg sigi ikki, at Niels ikki hevur fingið okkurt musiskt í móðirlegg av Skálafjørðinum, treyðugt so, men eyðsýnt er tað, at úr hansara budisttiska lyndi er sprottin ein tónleikamentan, sum hevur givið okkum so nógv, at Himmiríkið rúmar næstan ikki hesum ljóðkátu, tónleika fólkum. Tú kanst nevna eina røð av harmonikuspælarum, sangarum, fólki, sum spæla á onnur ljóðføri, úr hesari ætt. (Sam, Magnus, Evert, Poul Jakku, Heðin, Atli, Stanley, Helgi, Rói o. s. fr.)

**Vit og skil**

Gott vit og skil skal til tað, sum Niels hevur lagt úr hondum. Hann kann t. d. í orð og tal greiða frá sínari hugsan um upprunan til kingosangin. Hetta er áhugavert at hoyra, og er tað fáur her á landi, sum við síni hugsan, røkkur so langt. Hann veit nógv um svenskan vísusang, alheims arkitektur, list, kristnan átrúna, uppaling og kórsang.

Niels er ein heilagur maður, sum vit hava stóra virðing fyri. Tá vit hava fingið okkum sæti á okkar føstu bríkum í kirkjuni, kemur Niels inn eftir gólvinum. Hóast hann kemur í seinra lag – og tað eigur hann at gera, møtir hann stundisliga, tí vit onnur, sum eru telgd í øðrum líki, skulu, tá ið hann kemur av Kirkjuryggi í kirkjuna, kenna hansara mátt, megi og gloriu. Hetta guddómsríka, sum liggur yvir Nielsi, fáa vit gott av, meðan vit sita í halgidóminum, so er hansara nærleiki ....eitt ævinleika boð av magn og anda... og hetta meini eg bókstaviliga!!!!!

**Gittarin og hansara musikalsku evni**

Gittarin er hansara sál. Hann hevur hetta fima í sínum fingrabørnum, sum akta hann, tá ið hann spælir upp á hetta ljóðførið. Hann spælir í barokstíli, tá ið hann letur kingoløg í henda ljóðsæla dám. Hann rennur við neglunum eftir streingjunum, meðan hann spælir Evert Taube og Alf Proysen ella... bara tað, tá ið hann syngur: Mín blái Fordur, so er hansara námsfrøðiliga snildi í fingrasnippunum lagt í eina legu, sum spinnir sælar tónar og dreymar úr hesum ljóðføri.

Niels dugir eisni at seta út fyri blandað kór. Hann hevur dugnað Fuglafjarðar sangkóri í mong ár, sum basssangari og " húskomponistur". Lagið, Himnafaðir, hevur Fuglafjarðar sangkór tikið til sín sum sítt einkarbarn, og dámar okkum væl at syngja hesa mergjaðu yrking av Kristian Osvald Viderø.

Niels spælir es-bass í Fuglafjarðar hornorkestur, og eru teir báðir vorðnir sum stúkan og rekkjuváðin í hesum tónleika umhvørvi. Hetta ger, at Niels í hesum ljóðføri røkkur langt við síni mannahugsan um tónleik og tónleika mentan.

Við sínum lítilætna lyndi hevur Niels givið okkum alsk til vísir, kórsang, horntónleik, kingoløg, Evert Taube, Gunnleif Thomsen og Alf Proysen. Hetta er ein lívgevandi vágur, sum ríkar sinnið dag og dagliga , og vælsignað veri hondin ....... og røddin millum Kirkjurygg og Ennið.

Hjartaliga til lukku við sektsi ára degnum.

**Frits**




# Svend Åge Madsen deyður

Danski listamálarin Svend Aage Madsen í Billund andaðist á sjúkrahúsi í Vejle leygardagin, 81 ára gamal.

Svend Aage Madsen er kendur fyri sínar málningar av føroysku náttúruni, umframt at hann eisini hevur skrivað bøkur um sínar mongu vitjanir í Føroyum.

Hann var føddur í 1928 sum yngstur av trimum brøðum, og heilt frá ungum árum av málaði hann málningar. Hann arbeiddi tó meginpartin av sínum lívi sum bygningsmálari til lívsins uppihald.

Tað var á sumri í 1948, tá Svend Aage Madsen sum 20 ára gamal fyrstu ferð vitjaði í Føroyum, at hann forelskaði seg í føroysku náttúruni og øllum tí sum her rørist. Síðan tá málaði hann fyri tað mesta málningar við føroyskum myndevnum.

Saman við konuni Inge, var Svend Aage Madsen nógv í Føroyum, og fingu tey nógvar vinir her.

*-red*



